## Schuster stríðist



Venjarin hjá Real Madrid er í trongum skóm, nú úrslitini hjá felagnum hava verið eitt sindur misjøvn seinastu tíðina. Um vikuskiftið vann Real Madrid tó við neyð og deyð á botnliðnum Valladolid. Úrslitið var 1-0. Hildið verður tó, at sigurin, ið var so tepur, ikki lættir nakað serligt um trýstið á týska venjaran hjá kongaliðnum í Madrid.

## City sum Real

Brasilski Robinho hevur stórar vónir til framtíðina hjá enska felagnum Manchester City, sum hann spælir fyri. Robinho kom í summar til Manchester, og hann hevur stórað seg væl fyrstu tíðina. - Eg ætli mær at skriva søgu í felagnum, og eg rokni við at gerast ein av teimum stóru stjørnunum í Manchester City. Eg kom til City, tí eg sá, hvussu teir menna seg, og kanska kunnu vit blíva líka stórir sum Real Madrid, sigur Robinho við Daily Star.

Kyndil-Neistin 26-29 (12-16):

# Neistin mundi mist

**Kyndil hekk alla tíðina í Neistanu, og móti dystarenda var um reppið, at teir grønu vunnu sær eitt óvæntað stig frá meistarunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Tróndur Kragesteen í gjøgnumbroti móti Kyndils-verjuni. Kyndil tykist vera við at fóta sær, men talan gjørdist tó ikki um stig í grannauppgerðini sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Sum verjandi meistarar er Neistin eitt av liðunum, sum verður roknað millum favorittarnar í ár. Kyndil hevur hinvegin ikki somu styrki, sum teir áður hava havt, og tí varð roknað við, at talan var um yvirkomuliga uppgávu hjá teimum bláu sunnudagin.

Og fyrstu longu løtuna var heldur ikki nógv, sum bendi á nakað annað. Tó at munurin ikki gjørdist tann øgiligi, so legði Neistin skjótt sjógv aftur til Kyndil, og fram til seinastu 10 minuttirnar vóru støðugt 4-5 mál á muni.

Í øðrum dystum hevur seinasta løtan ofta verið tann vánaligasta hjá Kyndli, men hesa ferð hevði eyka orka helst verið í morgunmatinum hjá teimum grønu.

Í øllum førum kvettu teir av álvara burtur av leiðsluni hjá Neistanum seinastu løtuna. Bara tveir minuttir fyri leiklok var munurin komin niður á eitt mál, men Neistin fekk svarað aftur, soleiðis at teir við teimum báðum seinastu málunum stongdu dystin.

Hóast tapið, so prógvaði dysturin, at Kyndil er um at koma ígongd. Og hóast tað longu nú er langur vegur upp, so kundi tað væl hent seg, at teir fara at arga fleiri av teimum ovaru liðunum.

Millum hesi telist Neistin enn, men teir bláu fingu eina kraftiga áminning um, at kappingin í deildini er somikið jøvn, at tað ræður um at vera á toppinum, hvørja ferð farið verður á vøllin.

### FAKTA um dystin

**Kyndil-Neistin 26-29 (12-16)**
10 min: 4-8
20 min: 7-12
40 min: 17-20
50 min: 22-24
**Málskjúttar**
**Kyndil**: Hans Áki Dal-Christiansen 8, Bárður Johannesen 5, Høgni Klein 4(1), Tummas Paul Hanusarson 3, Jónleif Sólsker 2, Janus Einar Sørensen 2, Andreas Sólsker 1, Hans Arni B. Thomsen 1
**Neistin**: Finnur Hansson 11, Áki Mørk 5, Karl Herup Olsen 4, Jugoslav Djumic 4, Tróndur Kragesteen 4, David Edvardsen 1
**Brotskøst**: Kyndil 4, Neistin 1
**Útvísingar**: Kyndil 3, Neistin 5
**Dómarar**: Sámal Paulason & Kári Hansen

Tjaldur-StÍF 37-30 (16-15):

# Tjaldur heldur fast

**Hóast StÍF beit frá sær eina løtu, so halda Tjaldurs-kvinnur framvegis fast í fremstu liðunum**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Talan gjørdist um veruliga málveitslu, tá StÍF í gjár vitjaði í Runavík.

Tjaldurskvinnurnar vunnu dystin, men tað var ikki bara sum at siga tað, tí gjøgnum allan fyrra hálvleik hingu gestirnir heilt væl við.

Eftir steðgin eydnaðist tó Tjaldri at toga seg leyst. Eina løtu kom verjan veruliga upp at koyra, og tá tað ikki eydnaðist StÍF at halda fast í stóru skjúttunum hjá vertunum, kom munurin millum liðini til sjóndar.

Og hesum helt Tjaldur annars fast í. Eina løtu eydnaðist annars hjá StÍF at skora fleiri mál á rað, men veruligan spenning megnaðu tær kortini ikki at skapa.

Við sigrinum syrgdi Tjaldur fyri, at munurin upp til VB ikki øktist, og enn sum áður er málið hjá teimum gulu at vinna seg allan vegin til FM-finaluna.

### FAKTA um dystin

**Tjaldur-StÍF 37-30 (16-15)**
10 min: 6-4
20 min: 12-9
40 min: 23-18
50 min: 29-26
**Málskjúttar**
**Tjaldur**: Annika Thomsen 11, Alina Petrea 9(1), Elinbjørg Hammer 6, Alina Olaru 4(1), BGenedikta Johannesen 2, Jóhanna í Króki 1
**StÍF**: Ninna K. Johansen 11(2), Rebekka Justinussen 7, Fríðrunn Danielsen 6, Louisa Andreasen 3, Ásbjørg Káradóttir 3, Poula D. Olsen 2, Bára Berthelsen 1
**Brotskøst**: Tjaldur 2, StÍF 3
**Útvísingar**: Tjaldur 4, StÍF 1
**Diskvalifikatión**: StÍF 1 (beinleiðis reytt)


